# Anna fekk »Dronningens fortjenestmedalje«

MÓTTØKA

*Jón K. Joensen*

Fríggjadagin 15. juni hevði Anna Weihe, skrivstovufulltrúi, starvast 40 ár hjá Ríkisumboðnum.

Í hesum sambandi varð skipað fyri móttøku á skrivstovuni hjá Ríkisumboðnum, har bæði núverandi og fyrrverandi starvsfelagar umframt vinir og kenningar stukku inn á gólvið.

Ríkisumboðið hevði innstillað Annu til at fáa »Dronningens fortjenestmedalje«, og varð medaljan handað henni undir móttøkuni av ríkisumboðsmanninum Søren Christensen.

Ríkisumboðsmaðurin segði í talu síni, at Anna hevur hesi 40 árini arbeitt undir ikki minni enn sjey ríkisumboðsmonnum.



*Anna Weihe takkar ríkisumboðsmanninum, Søren Christensen fyri taluna. Millum tey er Inge, kona ríkisumboðsmannin*



*Anna og maðurin Heri Weihe*



*Anna og ein fyrrverandi lærlingur hennara, Shaila, ið nú starvast á Føroya Gjaldstovu í Fíggjarmálaráðnum*



*Ebba Debes, ið var „primusmotor“ á Ríkisumboðnum, tá Anna byrjaði har*



*Ríkisumboðsmaðurin heldur talu fyri Annu, og fyrrverandi starvsfelagar og vinir lýða á*



*Annu og systirin Borgarhjørt og maður hennara Hans og onnur í familjuni*